LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, 2. juli 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/09315-23
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum av einari umbøn um alment innlit

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá einum áhugafelag um málsviðgerðina av einari umbøn um innlit hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at innlitsumbønin ikki varð svarað fyrr enn 3½ mánað eftir, at umbønin varð latin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, serliga tá Arbeiðs- og brunaeftirlitið í svarinum til innlitsumbønina greiddi frá, at stovnurin ikki hevði skjøl fevnd av innlitsumbønini.*
*Umboðsmaðurin tók til eftirtektar frágreiðingina frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, at stovnurin nú hevur bøtt um sínar innanhýsis arbeiðsgongdir, soleiðis at støður sum hesar framyvir ikki skulu koma fyri í málum um innlit.*

## 2. Málslýsing

Tann 17. desember 2024 sendi Livilig kor soljóðandi umbøn um innlit til Arbeiðs- og brunaeftirlitið:

> "Góðan dagin
> Eg vil við hesum telduposti biðja um alment innlit í alla frágreiðingina í samband við eldvanlukkuna í Varðanum Pelagic í 2017."

## 3. Klagan

Við skrivi, dagfest 3. apríl 2025, sendi Livilig kor klagu til Løgtingsins umboðsmann, har Arbeiðs- og brunaeftirlitið og Umhvørvismálaráðið vóru á c.c. Klagan var soljóðandi:

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

“Hin 17. desember 2024 søktu Livilig kor um alment innlit í frágreiðingina í samband við eldvanlukkuna í Varðanum Pelagic í 2017 frá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum.

Eftir meira enn tveir mánaðir uttan svar, ryktu vit eftir svari hjá Umhvørvismálaráðnum hin 11. mars 2025.

Umhvørvismálaráðið svaraði okkum 26. mars 2025, at tey høvdu vent sær til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, sum skuldi fara at "kanna málið".

Vit hava framvegis onki hoyrt frá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum. T.e. vit hava onki innlit fingið, onga frágreiðing um, hví vit ikki fáa innlit ella nær svar kann væntast, ikki so mikið sum eina móttøkuváttan... “

Sama dag, sum klagan var móttikin, sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið soljóðandi svar til klagaran og kunning um hetta til umboðsmannin:

“Fyrst og fremst skal eg biðja teg og Livilig Kor um at halda Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til góðar fyri óvanliga longu og ónøktandi málsviðgerðina av hesum málinum.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur onki mál, sum beinleiðis snýr seg um eldsbrunan á virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri í 2017. Hetta skyldast, at tað ikki er ein partur av myndugleikaøkinum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum at kanna, eftirmeta ella gera niðurstøður í málum um eldsbruna. Hetta er hinvegin ein partur av myndugleikaøkinum hjá Løgregluni í Føroyum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið er vitandi um, at løgreglan kannaði málið um eldsbrunan, men liggur ikki inni við frágreiðing um málið.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur eftirkannað, um onnur mál eru í journalskipanini, ið passa til umbønina, men hevur bara mál um arbeiðstrygd í sambandi við uppruddingina og niðurtøkuna av brenda virkinum “

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 4. apríl 2025 sendi umboðsmaðurin skriv til klagaran, har víst varð til svarið frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum frá 3. apríl 2025 og spurt varð, um klagarin hevði viðmerkingar til skrivið.

Í skrivi dagfest 7. apríl 2025 svaraði klagarin m.a.:

"...

Vit í Liviligum korum hava undrast stórliga á, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið als ikki “var partur av nakrari yvirskipaðari og skipaðari eftirmeting av eldinum á Varðanum Pelagic á Tvøroyri í 2017”.

Tó væntaðu vit, at tað í minsta lagi varð skrivað onkur brunaeftirlitsfrágreiðing, síðan bygningurin varð bygdur aftur á sama stað og enntá víðkaður.

Í svarinum 7. mars 2023 varð um ikki annað sipað til eina eftirmeting av virkinum "í mun til reglurnar sum stovnurin tá umsat – t.d. reglurnar um trýstberandi ammoniakkskipanir."

Nú sigur ...*(mín við, stjórin*), at "Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur onki mál, sum beinleiðis snýr seg um eldsbrunan á virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri í 2017... [men, at] Hetta er hinvegin ein partur av myndugleikaøkinum hjá Løgregluni í Føroyum".

Vit kunnu bara taka undir við ... *(mín viðv. stjóranum),* at talan avgjørt er um ónøktandi málsviðgerð. Arbeiðs- og brunaeftirlitið átti at svara okkum beinanvegin eftir 17. desember 2024 og beint okkum á Løgregluna, um tað er rætti myndugleikin.

Hinvegin undrast vit framvegis á, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið slett onga frágreiðing ella viðgerð hevur havt av eldsbrunanum, sum kundi havt lagt alt Tvøroyri í oyði, var tað ikki fyri ættina, hin 9. juni 2017. Somuleiðis er tað óskiljandi, at hesin brunamyndugleiki als ikki hevur viðgjørt spurningin, um tað nú var skynsamt at byggja virkið upp aftur á sama stað, enntá í víðkaðum líki, bert tveir mánaðir eftir eldsbrunan – og sum nú, eftir ætlan, skal víðkast einaferð enn."

Tann 8. apríl 2025 varð klagan send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis. Samstundis varð Arbeiðs- og brunaeftirlitið biðið um at fyrihalda seg til viðmerkingarnar frá klagaranum frá 7. apríl 2025 og lata umboðsmanninum skjalayvirlit og øll skjøl í málinum.

Tann 11. mai 2025 sendi Arbeiðs- og brunaeftirlitið soljóðandi frágreiðing til umboðsmannin:

"Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal til at byrja við enn einaferð vísa á, at stovnurin harmast alt ov longu svartíðina, ið gjørdist meira enn tríggir mánaðir longri enn góður fyrisitingarsiður ásetur. Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur annars niðanfyristandandi viðmerkingar til viðmerkingarnar frá Livilig Kor.

Tað er rætt, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki var partur av nakrari yvirskipaðari eftirmeting av eldinum á Varðanum Pelagic í 2017, og at stovnurin onki mál hevur við greiningum av avleiðingum av eldsbrunanum og fyrivarnir í mun til staðseting av nýggja virkinum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið var ein rættuliga nýggjur stovnur (frá mai 2017) tá virkið brendi í juni 2017. Í hesum sambandi vóru fleiri av starvsfólkunum og undirritaði sjálvur í iva um fleiri av markamótunum við aðrar stovnar og lóggávu. Tískil kunnu fleiri av fyrstu samrøðunum við miðlar um hendingina geva eina fatan av, at stovnurin hevur ein annan leiklut enn hann hevði. Summar av samrøðunum eru eisini kliptar soleiðis, at tær gerast missvísandi.

Tað gjørdist tó innan stutta tíð greitt, at viðkomandi mál ikki var fevnt av myndugleikaøkinum hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, men hjá løgregluni, ið er myndugleiki fyri kanning av eldsbruna, og Tvøroyrar Kommunu, ið er staðbundni brunamyndugleikin tá talan ikki er um eldhættisligt virksemi fevnt av § 37 í tilbúgvingarlógini. Talan er um sama myndugleikabýti, sum er galdandi í flestu norðurlendsku londunum.

Í 2017 hevði Arbeiðs- og brunaeftirlitið heldur ikki ábyrgdina av samskipan av tilbúgving, ið ikki bleiv flutt til stovnin fyrr enn 2022. Tískil hevur stovnurin heldur ikki havt til

uppgávu at eftirmeta tilbúgvingarligu atlitini í sambandi við hendingina og uppafturbyggingina.

Tað einasta Arbeiðs- og brunaeftirlitið tískil eftirkannaði í sambandi við hendingina var, at køliskipanin, ið var ein trýstberandi skipan við ammoniakk, var góðkend og at har ikki vóru viðmerkingar/staðfestir manglar. Harumframt eftirkannaði Arbeiðs- og brunaeftirlitið um viðkomandi virksemi var fevnt av § 37 í tilbúgvingarlógini. Í hesum sambandi staðfesti stovnurin, at ongar viðmerkingar vóru til skipanina og at talan ikki var um virksemi fevnt av § 37 í tilbúgvingarlógini.

Hóast ongin ivi er um, at hendingin við eldinum á virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri í juni 2017 var ein sera álvarsom hending í bruna- og tilbúgvingarhøpi, er Arbeiðs- og brunaeftirlitið avmarkað til einans at kunna viðgera mál og spurningar, ið fella innanfyri myndugleikaheimildirnar hjá stovninum.

Síðan Arbeiðs- og brunaeftirlitið svaraði Livilig uppá upprunaliga umbønina um alment innlit í telduposti frá 3. apríl, har stovnurin millum annað staðfesti, at "Arbeiðs- og brunaeftirlitið er vitandi um, at løgreglan kannaði málið um eldsbrunan, men liggur ikki inni við frágreiðing um málið.", er stovnurin tó komin fram á tvey skjøl, sum møguliga eru viðkomandi fyri upprunaligu umbønina frá Livilig Kor. Talan er um:

- eina brunatekniska frágreiðing frá løgregluni, dagfest 19. juni 2017, har løgreglan ger eina fyribils meting av orsøkini til eldsbrunan, ið er tengd at komandi niðurstøðu frá DBI.
- eina brunatekniska frágreiðing frá DBI til løgregluna, dagfest 29. august 2017, har DBI metir seg ikki kunna gera eina niðurstøðu í málinum.

Hvørgin frágreiðing fyriheldur seg til tilbúgving frameftir, vandan fyri kringumhvørvinum, skilvísið í staðseting ella vandanum fyri endurtøku, men einans um møguligar tendringsorsøkir til eldin.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur í telduposti frá 5. mai kunna Livilig Kor um hesar frágreiðingarnar, og spurt um felagsskapurin ynskir innlit í hesar, hóast tær ikki eru um viðurskiftini sum felagsskapurin hevur áhuga í at lýsa nærri. Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur tó ikki hoyrt aftur frá Livilig Kor.

Eftirsum talan er um tilfar frá løgregluni, er vanligt at myndugleikin spyr løgregluna áðrenn innlit verður latið í tilfarið. Hetta er fyri at tryggja, at ongin partur er fevndur av trúnaðarásetingum, ið millum annað eru ætlaðar at verja vitnir í sambandi við revsimal v.m. Hetta er tað tó neyvan um í hesum førinum, eftirsum niðurstøðurnar frá frágreiðingunum hava verið í miðlunum fyrr."

Tann 14. mai 2025 bað umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiða nærri frá, hvør orsøkin var til seinkanina, t.v.s. hví einki varð gjørt við málið frá 17. desember 2024 og til stovnurin svaraði innlitsumbønini 3. apríl 2025. Eisini varð spurt, hvat stovnurin hevði gjørt fyri, at slíkar seinkarnir ikki henda aftur í innlitsmálum.

Tann 3. juni 2025 svaraði Arbeiðs- og brunaeftirlitið:

"...

- Orsøkin til at onki er gjørt við málið frá 17. des. 2024 og til vit svara Livilig Kor tann 3. apríl 2025 er, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hetta tíðarskeiðið hevur havt stórar avbjóðingar við einari ovurhonds stórari arbeiðsbyrðu á vanlukkutryggingarøkinum. Harumframt hevur stovnurin sama tíðarskeið havt sera nógvar sjúkrameldingar. Samanlagt hevur hetta havt við sær, fleiri mál ikki eru avgreidd rættstundis, millum annað hetta málið um alment innlit.

- Arbeiðs- og brunaeftirlitið, sum myndugleiki, harmast avgreiðsluna av hesum málinum, sum avgjørt ikki er í trá við góðan fyrisitingarsið ella vanliga siðvenju hjá myndugleikanum. Fyri at tryggja at hendan støðan og aðrar líknandi støður ikki endurtaka seg, hevur stovnurin gjørt niðanfyristandandi tillagingar:

  - Starvsfólkaorkan hjá stovninum er styrkt við 1 skrivstovufólki og 2 løgfrøðingum
  - Ein bygnaðarbroytingartilgongd er sett í verk, har umsitingin og løgdeildin blíva løgd saman í eina deil við deildarleiðara, soleiðis at hendan eindin verður styrkt
  - Eitt starvsfólk afturat blívur upplært sum journalførari,
  - Ein starv sum 'leiðslusamskipari', verður skipað. Tað verður millum annað uppgávan hjá leiðslusamskiparanum at tryggja, at øll tílík mál blíva avgreidd rættstundis."

Tann 10. juni 2025 kunnaði umboðsmaðurin klagaran um samskiftið við Arbeiðs- og brunaeftirlitið eftir viðmerkingarskrivi frá klagaranum frá 7. apríl 2025. Klagarin fekk 3 vikur at koma við møguligum viðmerkingum til framkomnu upplýsingarnar/frágreiðingarnar. Kunnað varð um, at eftir hetta fór umboðsmaðurin undir endaligu viðgerðina av málinum.

Tá freistin var farin, og umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, fór umboðsmaðurin undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 5. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina av innlitsumbønini.

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein almennur myndugleiki at skipa sínar arbeiðsgongdir soleiðis, at málsviðgerðin av einum máli ikki gerst óneyðuga drúgv.

Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan hóskandi tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Sambært § 16, stk. 2 hevur myndugleikin sostatt eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, um talan er um viðurskifti, ið fevnd eru av innlitslógini, og hvussu drúgv málsviðgerartíðin kann væntast at verða.

Fráboðanarskyldan, sambært § 16, stk. 2, er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera, at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Í hesum føri varð umbønin um innlit ikki avgreidd fyrr enn uml. 3½ mánaðir vóru farnir, síðani umbønin varð latin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Hetta var eisini eftir, at klagarin umvegis Umhvørvismálaráðið hevði mint á málið og eftir, at klaga varð latin umboðsmanninum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði í hesum tíðarskeiði hvørki latið eina móttøkuváttan og heldur ikki givið nakra kunning til klagaran um orsøkina til seinkanina, og nær ein avgerð kundi væntast. Hetta haldi eg vera átaluvert.

Vísandi til omanfyrinevndu frágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, haldi eg, at tær orsøkir, ið stovnurin vísir á sum atvold til longu málsviðgerðartíðina, ikki kunnu metast sum umberandi orsøk fyri, at ongin kunning varð givin til klagaran um støðuna og útlitini fyri, nær innlitsumbønin fór at verða avgreidd.

Somuleiðis haldi eg, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið átti at havt viðgjørt og avgreitt umbønina um innlit skjótari. Eg meti, at stovnurin uttan stórvegis hóvasták kundi svara klagaranum, at stovnurin ikki hevði nøkur skjøl, sum svaraðu til innlitsumbønina, og at orsøkin til hetta var, at viðurskiftini handan innlitsumbønina ikki vórðu fevnd av virkisøkinum hjá stovninum.

Ein myndugleiki hevur skyldu at skipa síni viðurskifti soleiðis, at eitt nú stór arbeiðsbyrða ella sjúka í starvsfólkahópinum nerva vanligu málsviðgerðina hjá myndugleikanum sum minst. Hetta kann eitt nú gerast við at hava greiðar mannagongdir kring málsviðgerð, kunning og skjalføring í sambandi við málsframhald av málum, ið eru til viðgerðar, soleiðis at mál ikki liggja ella detta niðurfyri, um so er, at arbeiðsbyrða ella sjúka gera seg galdandi.

Eg taki tó til eftirtektar, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur upplýst fyri mær, at stovnurin nú hevur bøtt um sínar innanhýsis arbeiðsgongdir, soleiðis at støður sum hesar framyvir ikki skulu koma fyri í málum um innlit.

Eg fari samanumtikið at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður